## DiBa Bank lænir 160 milliónir



DiBa Bank hevur gjørt eina avtalu við statin um hybridan kjarnukapital á 160,685 milliónir krónur umvegis Bankapakka II. Tað boðar bankn frá í einum tíðindaskrivi. »Grundað á roknskapin fyri annan ársfjórðing 2009 hevur upptøkan av láninum ført við sær, at kjarnukapitalurin hjá DiBa Bank er hækkaður til 12,6%, og at solvensurin frameftir verður 18,1, sigur bankin í skrivi. Tað veit boersen.dk at siga.

## Suðurkoreanar flýggja norðureftir

Ein suðurkoreanskur arbeiðari flýggjaði til stalinistiska Norðurkorea í vikuni, eftir at hann hevði stríðst seg gjøgnum sterkt varda marknaðarøkið. Tað vilja statsligir miðlar í Pyongyang verða við. Sambært Koreansku Miðtíðindastovuna er 30 ára gamli Kang Dong-Rim komin til Norðurkorea frá lítlu bygdini Beolgyo. Ein frágreiðing um flýggjan frá Suðurkorea til Norðurkorea kemur vanliga ikki fyri, meðan umleið 17.000 norðurkoreanar eru flýddir frá svongd og kúgan í stalinistiska statinum síðani Koreakríggið frá 1950 til 1953. Flestu norðurkoreanar flýggja umvegis Kina, tí markarøkið millum koreansku londini er væl vart og lagt við minum, skrivar Politiken.




*Fleiri línuskip hava verið undir Íslandi í seinastuni, men fiskiskapurin hevur verið smáligur. Á seinasta túri har yviri hevði Jákup B (mynd) umleið 100.000 pund, meginparturin av veiðini var brosma og longa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Landa trol- og línufisk í Klaksvík

**Føroysku línuskipini, sum í seinastuni hava verið undir Íslandi, hava yvirhøvur havt smáligan fiskiskap. I vikuni koma tvey ella trý línuskip aftrat, sum landa í Klaksvík, undan Íslandi**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag landa partrolararnir, Safir og Smaragd, í Klakvík. Teir hava roynt í eina góða viku, og veiðan liggur um 160.000 pund, meginparturin er upsi.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík vænta tey línuskipið Kvik í morgin og Klakk hósdagin. Teir eru báðir undir Íslandi, men sum skilst, hevur fiskiskapurin verið smáligur har yviri.

Línuskipið Helena er eisini undir Íslandi hendan túrin.

Á seinasta túri undir Íslandi hevði línuskipið Jákup B eini 100.000 pund, meginparturin av veiðini var brosma og longa.

Jákup B er nú undir Føroyum, og á Landingarmiðstøðini í Klaksvík hava tey frætt um tvær setur hjá skipinum, sum góvu ávikavist 10.000 og 12.000 pund hvør.

### Meira toskur

Úr Klaksvík verður annars sagt, at útróðrarbátarnir eru byrjaðir at fáa fisk aftur, og frægastu seturnar hava bátarnir ligið millum 5.000 og sløk 8.000 pund, meginparturin er toskur.

- Útróðurin hevur nýliga tikið seg uppaftur, og eg haldi, at bátarnir hava havt hampiligan fiskiskap í seinastuni. Teir hava ligið um eini 100 pund á línuna, og hjá onkrum hevur veiðan roynst enn betri, verður sagt á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík.




*Besti prísurin á toski 1 fór í gjár upp um 30 krónur fyri kilo á Fiskamarknaði Føroya. Miðalprísurin fyri bestu toskastøddina var 27,21 fyri kilo*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Besti toskaprísur var omanfyri 30 krónur fyri kilo

**Meðan prísirnir á toski í seinastuni hava verið hampiliga góðir, gongur verri at fáa góðan prís fyri eitt nú hýsu, brosmu og longu**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Besti toskaprísurin í gjár var stívliga 30 krónur fyri kilo. Hetta var fyri tosk 1. Miðalprísurin fyri bestu toskastøddina var annars góðar 27 krónur fyri kilo.

Toskur 2 fór í gjár fyri 2 4,29 krónur í miðal fyri kilo og toskur 3 fyri slakar 17 krónur fyri kilo.

Størstu nøgdirnar vóru av toski 4, sum fór fyri miðalprísin 13,24 krónur fyri kilo.

Á Fiskamarknaði Føroya siga tey, at nøgdirnar av toski eru øktar í seinastuni, og kortini hava prísirnir verið rættiliga støðugir.

- Toskaprísurin er farin spakuliga uppeftir, men enn er fiskurin ikki vorðin so dýrur, sum hann var fyri einum ári síðan, siga tey á Fiskamarknaði Føroya.

Fyri onnur fiskasløg er lítil øking at síggja í prísi, og tó at nøgdirnar av hýsu eru smáar, er ikki líkt til, at hýsuprísurin er batnandi.

Prísirnir á longu og brosmu eru heldur einki serligir í løtuni, siga tey á Fiskamarknaði Føroya.

Samlaða sølan í gjár var 245 tons, sum fóru fyri tilsamans 2,4 miljónir krónur.